# Ferðslusamskiparar til Atlantic Airways Pf., Vágar

Okkara Operations deild í Vágum er hjartað í dagliga flutningsvirkseminum hjá Atlantic Airways. Til hesa deild søkja vit eftir fleiri nýggjum starvsfeløgum, sum skjótast tilber kunnu gerast partur av okkara framtakshugaða toymi. Sum partur av hesi deild tekur tú lut í arbeiðinum at samskipa dagligu ferðsluna, flotan og manningina. Í starvinum er neyðugt at taka skjótar og rættar avgerðir á fleiri stigum, tí tú hevur beinleiðis ávirkan á okkara dagligu flogavgreiðslu. Starvið hevur við sær skiftandi vaktir og arbeiðstíðir. Í starvinum hevur tú tætt samstarv við teknisku deild, flogvallastarvsliðið, farmadeildina og flogmanningina, umframt at tú ert við til at leggja arbeiðstíðir hjá manningini til rættis.

**Útbúgving og royndir**
Tú eigur at hava eina hóskandi útbúgving og ella royndir innan flogferðslu – gjarna sum nýútbúgvin flogskipari, ið hevur hug til at læra okkum at kenna á jørðini, áðrenn tú seinni møguliga fert á flog. Royndir sum flogavgreiðslufólk, dispatchari, AFIS-operatørur ella ferðsluhjálparfólk eru eisini serliga viðkomandi. Vit síggja til, at røttu umsøkjararnir fáa ta upplæring og skeiðstilboð, ið eru neyðug. Týðandi er, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni, samstundis sum tú ert tænastu- og søluhugað/-ur. Vit vænta, at tú ert fleksibul, tá ið átrokandi støður koma fyri. Aftur at hesum hevur tú skil fyri KT og dugir eingilskt í skrift og talu.

**Vit bjóða**
Starvið er áhugavert og avbjóðandi, og møguleiki er fyri persónligari menning, har persónlig ábyrgd og góðska eru leiðorð. Nógv toymissamstarv er á deildini, sum í løtuni telur 6 starvsfólk.

Lønin verður í samsvari við førleika og starvstreytir. Aftur at hesum verður høvi til ókeypis ferðir, eftirløn og trygging sambært starvsfólkapolitikki felagsins.

**Umsókn**
Nærri upplýsingar um størvini fáast hjá Rasmusi Niclasen, leiðara á Operations deildini, tel.: +298 213721 og +298 341039, ella: rasmus@atlantic.fo

Skrivlig umsókn við CV og avriti av prógvum o.ø. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. apríl 2008 og skal sendast til:

Atlantic Airways, Human Resources
Att.: Georg Suðurgarð
Vágar Airport, FO-380 Sørvágur, Føroyar
ella til: georg@atlantic.fo

sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka, hvørs virkismentan er eyðkend av, at fokus altíð er á trygd, stundvísi, kundan og úrslitið. Umleið 250 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, sum hevur heimstað í Sørvági. Árligi umsetningurin í 2007 var 539 milliónir krónur.
Atlantic Airways hevur sjey flogfør og fýra tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi, Noregi og Svøríki. Harumframt er virksemið víðfevnt í øðrum londum við leiguflogførum, og umleið helvtin av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

Tel 34 10 00 · Faks 34 10 01 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo

